# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*






*Hybridbilurin Toyota Yaris HSD*

# Toyota Yaris hybridbilur

Toyota hava sett sær sum mál, at øll modellini hjá teimum skulu fáast sum hybridbilar. Síðst í 2010 kom Toyota Auris sum hybridbilur, og nú stendur Yaris fyri tørni.

Á altjóða bilaframsýningini Geneve Motor Show 2011, sum var frá 3. til 13. mars, sýndu teir fram hybridbilin Toyota Yaris HSD. Eisini varð Toyota iQ sýndur fram sum reinur elbilur.

*Kelda: www.reyniservice.fo*



# Bátur á bilasølu

Á framsýningarøkinum hjá Berg Motors verður ein bátur lýstur til sølu millum bilarnar. Onkur kom við uppskoti um at sett bátin í sjálva rundkoyringina, so Havnin kundi havt ein stuttleikabát sum symbol, eins og klaksvíkingar hava húkin.

**Hósdagin 17. mars kl. 16.10**

Í sendingini verður vitjað á Brennistøðini á Hjalla, har stjórin Bárður Mikkelsen fortelur um, hvussu tað gongur fyri seg, tá bilar verða upphøgdir og burturbeindir.

Eisini senda vit samrøður, sum vórðu gjørdar tá Bussleiðin í høvuðsstaðnum bleiv 30 ár. Samrøður eru við Finn Johansen, fyrrverandi býráðslim, um hvussu bussleiðin byrjaði, og við Hildebrand Midjord, bussførara, sum fortelur hvussu koyriumumstøðurnar í høvuðsstaðnum fyrstu árini.



Bárður Mikkelsen



Finnur Johansen

2
Vinnu- & bilradio á Rás